í gerð. (Tað má hava verið ein umbygging).

Ætlanin var, at eg skuldi fara yvir aftur til mítt kæra Bergen, men pápi bleiv sjúkur um veturin 1908/09, og tann sjúkan vardi til hansara deyða í apríl 1912, og eg fór ikki yvir aftur.

### Lagasmíð í Bergen

*Petur greiðir nokk so nógv frá uppihaldinum í Noregi. Her skal bert takast tað við, sum hevur samband við hesa frásøgn, eisini um sang.*

Ein morgun stóð eg og málaði inni. Vindeygað stóð opið, og eg sang av hjartans lysti "Várt fagra heim, várt dýra land". (Lagið "Og Guð vors lands). Eina løtu seinni fór eg út eitt ørindi, og Wathne kom til mín slíkt kvøld (18. juli 1908) gjørdi eg lagið til "Eg elski teg land". Ein sunnudag eftirmiddag stutt aftaná smíðaði eg eisini her í Bergen løgini til Havið: "So bylgjandi blátt" og "Her er eingin føroyingur at finna".

### Løg til sjónleik

Í teimum døgunum fekk eg bræv frá Kristin bróður, har hann bað meg senda sær nótarnar til "Tú alfagra land mítt", "Tjaldur ver vælkomið", "Eg elski tíni eygu" og "Legg tínar armar um háls mín". Teir skuldu nýtast í einum sjónleiki, teir skuldu spæla í Havn á Ólavsøku til 100 ára minning Nólsoyar Pálls. Tá eg sat og skrivaði hesi løgini fyri at senda tey til Føroyar, tá komu fram fyri meg allar tær stundir



Hans Andrias Djurhuus hevur ein stóran leiklut í hesi frásøgn. Hetta er standmynd av honum. Aftanfyri sæst "Hans Andriasa hús", har hann búði frá 1936 til hann doyði í 1951

og segði, at eg hevði eitt frálíkt mál, og hann ivaðist ikki í, at eg hevði sloppið til teatrið, um eg hevði lært at sungið. Hann ráddi mær til at taka tímar í sangi á Bergen Musikkonservatorium, har hann sjálvur hevði gingið. Eg var ógvuliga fegin yvir tað, hann segði, og ætlaði eg mær eisini at tosa við fyristøðumannin, men tað kom ongantíð í lag.

Við hvørt sat eg einsamallur inni, tá regnið oysti niður, og eitt í Ungmannafelagnum og aðra staðni, har eg hevðu sungið hesar mínar sangir, og eg var eitt sindur sárur um hjarta av longsli. Eisini ynskti eg mær at vera við til sjónleikin og alt starvið frammanundan.

Seinni, aftaná ólavsøku, fekk eg brøv frá Føroyum, frá pápa og Poul bróðuri, sum søgdu frá, hvussu óførur gravgangur hevði verið eftir billettum til sjónleikin, ið bar navnið Ófriðarligar Tíðir.



*Nyholm Debes var ein av stigtak-arunum til Ungmannafelagið. Hann var skald og eisini løgtingsmaður*

Áh, sum eg sá Havnina og heimið fyri mær í kærum hugnaligum ljósi! At kunna hava verið har uppi um Ólavsøkuna og spælt Løbner, sum ætlanin var, tað hevði verið stuttligt! Og nú gekk eg her og tvassaði og sá ikki ein føroying, dag út og dag inn. Eg var ótolin og longdist, men eg havi jú higartil "dansað á rósum" gjøgnum lívið og kendi ógvuliga lítið til beisku síðuna av lívinum.

Brøvini søgdu mær eisini frá tí stóra brandinum hjá Z. Heinesen 1. august. Tað var ógvuliga interessant at lesa um, ein øgilig hending í tí lítlu stillu Havnini. Tí betri doyði eingin.

### Baldursbrá kom 105 ferðir

Petur skrivar ikki meira um Ungmannafelagið í síni dagbók. Men hann hevur tó verið virkin í felagnum eftir heimkomuni. Hetta sæst á Baldursbrá, har hann hevur verið ritstjóri á fleiri av bløðunum seinastu tíðina hjá Ungmannafelagnum.

Baldursbrá kom út 105 ferðir. Av hesum stóð Petur Alberg sum ritstjóri á 16 av hesum bløðum. Samlaða síðutalið er omanfyri 1.000. Her er nógv spennandi tilfar, sum vit uttan iva fara at koma aftur til. Fyrst og fremst lýsir hetta tilfar tey áhugamál, sum ungdómurin í Havn hevði.

Eins og í dag var fótbóltur eisini eitt av tí sum áhugi var fyri. Her kann til stuttleika endutakast frásøgn frá ársveitslu hjá HB í 1906.

## Summarnáttin

**Røða hildin leygarkvøldið 25da apríl 1908 í teatirsalinum av H A Djurhuus. (tá eg skuldi fara avstað til Bergen).**

**Henda røða er umrødd í frásøgnini hjá Peturi, og sum tað sæst er hon uppá rím.**

Summarnáttin er dreymanna stund,
tá lýður ein fegin á alt,
kenslurnar vakna og trygg kennist lund
og mangt finnist, ið áður var fjalt.
Tá valdar hitt dulda í sálini býr,
mót víðskygdum hægdum sær fóturin snýr,
hvar lotini leika so svalt.
Hoyrir tú mutla streymandi á?
Hvat man tað vera sum hon sigur frá?
Skilir tí kvæðið? Hon kvøður
um ferð yvir fjøllini há.

Settist tú nakrantíð fossinum hjá
á nátt meðan alt var kvirt.
Hoyrdi tú ikki eitt kvæði tá,
sum náttin sjálv hevur yrkt.
Væl var tað hulið, hitt dragandi ljóð,
djúpt tá hvørt orð seg í sálina gró,
og tú kendi sinni títt styrkt.
Fagurt var kvæðið, sum nykurin kvæð,
hugtikin satst tú og lýddi á tað.
Kendi tú ei slíkar løtur
teg mentan at kvøða eitt lag.

Hoyrdi tú ljóðið hitt hulda, sum fer
leikandi fram sína leið?
Kendi tú føgur ein summarnátt er?
So svíkir eydnan teg ei.
Skilti tú rætt hin alfagra sang,
sum vindurin ber yvir tindar og ong
so verður framferðin greið;
tí fatar tú náttina, hennara rødd,
so verður í vanda ei sálin tín stødd,
tá fær tú sigrandi vónir
og øll tíni sár verða grødd.

Summarnáttin er meginar stund,
tá setist mangt verkið á stovn.
Summarnáttin er kenslunar stund,
hon veitir tær treystastu vón.
Bygdi tú ikki tær skýhøga høll
meðan dimmið, hitt hvílandi, eymt fevndi fjøll
og sást manga dárandi sjón.
Elskar tú náttina, hennara song
setur tær nykur á harpuna strong
so lærir tú fossakvæðið
og áarløgini mong.

Og fert tú enn burtur til onnur lond,
hvar alt tykist stórt tær og nýtt
ljósnættarkvæðið, hin ljósnáttar ond
fylgir so langt tær og vítt,
dregur teg aftur at heimligu strond,
tí okkara summarnátt eigur trý bond,
ið draga hvønn aftur til sítt.
Skilti tú kvæðið sum fossurin kvæð,
kendi tær nykurin náttana lag,
veit eg, at tú kemur aftur
eins og tú nú fert avstað.

So ynski eg tær eina góða ferð,
ein bjartan ein sólríkan dag.

# Gildið í fótbóltsfelagnum

Havnar Fótbóltsfelag helt sítt triðja ársgildi seinasta leygar-kvøldið. Øll gildini hava verið stuttlig og hugnalig, tí haldi eg hetta seinasta bar av, og tykir mær, at ungdómurin í Havn dugir at koma saman til stuttleika í góðum lagi. Tað tykir mær, at tað er ein broyting í mátanum at stuttleika sær og haldi eg, at tann broytingin er góð.

Væl var fyristaðið, bæði við mati, stuttleika og skemtan. Teatursalurin var vakurt skrýddur, vakrari enn nakrantíð fyrr og sinnið var ljóst og kátt hjá øllum. Tað var dansað føroyskur, eingilskur og norskur dansur. Skiftandi sangur, sungin av sangfelagnum Ljómur, røður hildnar og ymisk spøl spæld.

Eitt kvøld við góðum minnum og hopandi, at fleiri slík máa eydnast ungdóminum í komandi tíðum.